# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

Oyggjablaðið í næstu viku:
**BØKUR**

## Hiti & bjálving

**Í hesum blaðnum viðger Oyggjablaðið spurningin um hita og bjálving.**
**Lesið um:**

**Síða 14:**
Heimsins grønasta gistingarhús

**Síða 16:**
Populer passivhús í Noregi

**Síða 18-19:**
Nógv at spara við berghita

**Síða 22:**
Oljufýrar verða skjótt søga

**Síða 24-25:**
Marjus velur ta føroysku loysnina

**Síða 26:**
Soleiðis heldur tú húsið heitt

**Síða 28-29:**
Baldvin forðar hitalekum

**Síða 31:**
Øll kunnu spara meiri

Heimildir:
Samrøður
www.sev.fo
www.sev.fo
www.jarðfeingi.fo
www.jarðfeingi.fo
Norskar heimasíður

# Heimsins grønasta gistingarhús

**Hugsar tú um CO2-útlát, endurnýtsluvatn og lágorku, tá tú skalt gista uttanlands, kanst tú sum ferðafólk við góðari samvitsku leita tær á eitt gistingarhús í Keypmannahavn.**

Snorri Brend

**Danmark:** Crowne Plaza Copenhagen Towers hevur júst fingið virðisløn fyri at vera heimsins grønasta gistingarhús.

Gistingarhúsið hevur fingið EcoTourism Award sum ein umhvørvistilvitað fyrimynd hjá øðrum gistingarhúsum, skrivar Berlingske Tidende.

Gistingarhúsið, sum liggur í Ørestad, hevur størsta sólkyknuanleggið í Norðurevropa á framsíðuni á bygninginum, sum veitir streym, meðan grundvatnið syrgir fyri køling og upphiting í luftingarskipanini á gistingarhúsinum.

### Lívfrøðilig evni

Bæði sjónvarp og lampur eru útgjørd við lágorku, og allar sjampofløskur, tannbustur og baðihettur eru úr lívfrøðiligum evnum, sum ongan skaða gera á náttúruna. Matstovan brúkar lokalar rávørur, og alt burturkast verður til biogass og tøð.

Hevur tú sum gestur á gistingarhúsinum hug at venja eina løtu, kanst tú taka tær ein súkklutúr á streymframleiðandi súkklunum á gistingarhúsinum. Øll, sum framleiða 10 watt tímar, fáa eina ókeypis máltíð á norðurlendsku matstovuni á gistingarhúsinum.

– Hetta er fyrstu ferð, virðislønin fer til Danmarkar. At hetta hevur eydnast okkum, haldi eg, er tí, at grøni hugsunarháttur okkara gongur aftur allastaðni - frá teimum heilt smáu lutunum til teir stóru, sigur Allan L. Agerholm, stjóri á gistingarhúsinum.*www*




**GRØNT**

*Hóast bilurin hevur annan lit, er eingin ivi um, at tað er tann grøni hugsunarhátturin sum gongur aftur allastaðni á Crown Plaza Hotellinum í Keypmannahavn*